

*Fyri umleið trimum árum síðani møtti Dasha einum føroyingi á einari veitslu fyri støk í St. Petersburg. Hon sigur, at hon visti beinanvegin at hesin róligi persónurin var ein góður maður.*

*Dasha og sonurin, sum dugir betur føroyskt enn hon, tí hann sleppur at fáa frálæru í og á føroyskum hvønn dag.*

Nýføroyskar kvinnur:

## Vit eru fluttar – ikki innfluttar

Ofta verður sagt, at føroyingar eru allastaðni. Føroyingar ferðast og arbeiða um allan heim, og tí er tað kanska ikki so løgið, at hetta førir til nýggj altjóða sambond. Fólk hittast, gerast væl og velja sær eitt felags heimland.

# Russiskur

**"I met a very good man". Hetta er einfalda grundin til, at 35 ára gamla Dasha Jacobsen úr russiska stórbýnum St. Petersburg nú býr á Garðavegi í Klaksvík.**

SAMRØÐA
*Dorit Hansen*
*Dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Høgni Thomsen*

Stilla og blíða kvinnan bjóðar vælkomin í hugnaligu og einkult innrættaðu stovuni. Hon hevur bakað føroyska kaku og situr og gevur trígjar mánaðir gamla Tórsteini bróst, meðan vit práta.

Hon hevur bara búð í Føroyum í eitt ár og tosar ikki so nógv føroyskt enn. Tó so, tá telefonin ringir svarar hon á føroyskum, og tølini dugir hon líka væl á føroyskum sum á enskum. Tíggju ára gamli sonurin, sum situr og spælir telduspæl, tosar longu flótandi føroyskt.

### Barn í kommunistiska Russlandi

Dasha var umleið fimmtan ára gomul, tá ið Gorbatjov innførdi demokratiskar reformar í kommunistiska Sovjetsamveldinum. Hon var stutt síðani flutt til St. Petersburg saman við foreldrum sínum. Foreldrini vóru bæði verkfrøðingar. Pápin arbeiddi í herðinum

*Dasha hevði ynskt, at hon kundi farið á eitt intensivt skeið í føroyskum á sama hátt sum innflytarar í Danmark gera.*

---

Kvinnuhald í Vágunum:

# Innfluttar kvinnur



**Kvinnubólkurin í Vágum skipar í kvøld fyri kvinnudegi við áhugaverda og ikki sørt provokerandi heitinum, "Innfluttar kvinnur í Føroyum."**

JAVNSTØÐA
*Dorit Hansen*
*Dorit@sosialurin.fo*

Fundurin verður í Bygdaskúlanum í Miðvági, klokkan 20. Røðarar verða leiðarin í Kvinnuhúsinum Elin Reinert Planck, landsstýrismaðurin í innlendismálum Jacob Vestergaard, Súsanna Nordendal, løgfrøðingur, Emmy Joensen frá mentamálaráðnum umframt eitt umboð fyri politiið.

### Kvinnuhaldið

Kvinnubólkurin í Vágunum varð stovnaður fyri nøkrum árum síðani við tí endamálið at fáa fleiri kvinnur upp í politikk. Tær plaga at skipa fyri einum 8. mars haldið, og í ár hava tær valt eitt evnið, sum kanska vísir, at tørvur er á einum kvinnuligum sjónarhornið – eisini í politikki.

Marjun í Kálvalíð, ein av fyriskiparunum, sigur, at tær hava valt hetta evnið, tí fleiri og fleiri kvinnur koma til Føroyar við einvegis ferðaseðli og eini adressu í hondini. Adressan vísir vegin til ein mann, sum tær skulu giftast við, men als ikki kenna. Hetta er ein samfelagsligur trupuleiki, tí mangan enda hesi sambond ólukkuliga, og kvinnurnar standa eftir einsamallar, uttan netverk, og ofta uttan møguleika at klára seg sjálvar.

### Innfluttar kvinnur

Gomlu katalogini frá Daells Varehus koma ikki longur í hvørt hús í Føroyum, men í summum húsum eru nýggj katalog komin í staðin. Hesi lokka ikki við lekrum frakkum og heitum handskum, men við ungum, eiggiligum kvinnum. Trafficking – søla av kvinnum til prosituitión og slavuarbeiði- er ein vaksandi trupuleiki í Vesturheiminum. Men innfluttu kvinnurnar í Føroyum eru ikki keyptar til víðarisølu. Tær koma, tí nakrir menn ynskja ein kvinnukropp í songini og nakrar kvinnuhendur í køkinum.

Innfluttu kvinnurnar eru í serligari støðu og mugu fáa tann stuðul tær hava tørv á. Men Marjun í Kálvalíð sigur, at sjálvandi hevur tað týdning, at allar kvinnur, sum flyta til Føroyar, fáa nøktandi umstøður og virðiliga viðferð. Føroyar hevur ongan integratiónspolitikk. So hvør tryggjar rættindini hjá hesum kvinnum?

Hvussu tryggja vit, at hesar kvinnur og børn teirra læra føroyskt mál og føroyska mentan? Hvør hevur ábyrgdina av, at tær fáa upplýst skyldur og rættindi? Og hvussu hjálpa vit teimum kvinnunum, sum enda saman við harðendum monnum ella monnum, sum ikki halda, at kvinnur hava sama virði sum onnur menniskju. Hetta er nakrir av spurningunum, sum verða viðgjørdur í Miðvági í kvøld.

### Kvinnur í neyð

Kvinnuhúsið er eitt stað, har kvinnur í neyð kunnu leita sær hjálp. Leiðarin í Kvinnuhúsinum Elin Reinert Planck sigur, at árliga søkja umleið trígjar kvinnur av útlendskum upprunað sær hjálp hjá teimum. Flestu ynskja at verða verandi í Føroyum, tí tær hava ikki nakað at venda aftur til. Børnini eru føroysk, og her kunnu tær geva teimum eina framtíð. Kvinnurnar kunnu eisini risikerað at verða útstoyttar, um tær venda aftur til heimlandið.

Elin Reinert Planck sigur seg onki kenna til trafficking í Føroyum, men tað kann gott vera, at onkur hevur vunnið sær pening við at seta kvinnurnar í samband við føroyskar menn. Elin heldur eisini, at tað kann vera vandamikið at kalla hesar kvinnur 'innfluttar'. Her er kanska brúk fyri eini hugburðsbroyting, so vit ikki døma hesar kvinnur út frá egnum fordómum.